**2010**

# ÁLITISFÓLKAAVTALA

Millum Fíggjarmálastýrið/avvarðandi kommunala arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag verður gjørd henda avtala fyri álitisfólk felagsins.

**Stk. 1.**

Tá tað á einum arbeiðsplássi starvast í minsta lagi 3 limir Føroya Pedagogfelags, hava hesir limir rætt til at velja sær eitt álitisfólk.
Tá eitt arbeiðspláss fevnir um fleiri deildir, skulu deildirnar roknast sum sjálvstøðug arbeiðspláss.
Á tílíkum arbeiðsplássum velja álitisfólkini eitt felags álitisfólk.
Nevndarlimir og álitisfólk felagsins kunnu ikki verða uppsøgd, uttan at uppsøgnin fyrst hevur verið til viðgerðar ímillum Fíggjarmálastýrið/avvarðandi kommunala arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag. Hetta sama er galdandi í 2 ár aftaná at nevndarlimir ella álitisfólk eru givin í álitisstørvum teirra. Uppsagnartíðin hjá starvsfólki, sum eru vald til álitisfólk, verður longd soleiðis, at 3 mánaðir verða lagdir afturat uppsagnartíðini, sum hvørt einstakt álitisfólk hevur innvunnið.

**Stk. 2.**

Til álitisfólk kann bert veljast tann, ið hevur fulltíðarstarv og hevur arbeitt á viðkomandi deild í minst ½ ár. Undir serligum umstøðum kann tað gerast neyðugt at víkja frá hesum. Fyri hvørt álitisfólk skal veljast eitt varafólk.

**Stk. 3.**

Við val av varaálitisfólki eru somu reglur eins og í stk. 1 og stk.. 2 galdandi.

**Stk. 4.**

Valið hevur ikki gildið, fyrrenn tað er góðkent av Føroya Pedagogfelag og er fráboðað leiðsluni á avvarandi stovni. Hendan fráboðan eigur at vera gjørd í seinasta lagi 14 dagar eftir valið.

**Stk. 5.**

Álitisfólk hava eins og leiðslan - skyldu til at ansa eftir at lógir, sáttmálar og aðrar avtalur, ið eru galdandi fyri arbeiðsplássi verða yvirhildnar. Álitisfólkið, ið er talsmaður limanna, hevur saman við leiðsluni ábyrgd av, at limirnir verða kunnaðir og tiknir við í ráðum um mál, ið viðvíkja arbeiðsplássinum.
Álitisfólkið skal eins og leiðslan syrgja fyri best møguligum samstarvi og góðum arbeiðsviðurskiftum.

**Stk. 6.**

Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at leggja fyri deildar- og stovnsleiðsluna uppskot, áheitanir og klagur frá limum, og at taka upp samráðingar um innanhýsisviðurskifti. Álitisfólk skal vera ráðgevandi fyri leiðslu og limir um arbeiðsviðurskifti, rættindi og skyldur.

Álitisfólkið hevur skyldu at kunnað limirnar á stovninum og Føroya Pedagogfelag um øll viðurskifti,  ið viðkoma teimum.
Har einki álitisfólk er, skal leiðslan tingast við nevnd felagsins um øll viðurskifti, sum annars skuldi verið løgd fyri álitisfólkið.

**Stk. 7.**

Tá talan er um setan ella uppsøgn av starvsfólki, skal leiðslan samráðast við álitisfólkið á avvarandi deild. Verða starvsfólk uppsøgd, skal hetta fráboðast felagnum. Verða partarnir ikki samdir í uppsagnar- ella setunarmálum, skal álitisfólkið leggja málið fyri felagið.

**Stk. 8.**

Álitisfólkið skal uttan lønarmiss - í samráð við arbeiðsplássið - í arbeiðstíðini hava rætt til at taka sær av málum, ið viðvíkja starvsfeløgum ella arbeiðsviðurskiftum, soleiðis at málið kann fáa eina fullgóða viðgerð. Somuleiðis hava álitisfólk í arbeiðstíðini rætt til at møta á fundum, sum felagið skipar fyri. Somuleiðis á felagsfundum millum álitisfólk. Tá álitisfólk søkja um at koma á álitisfólkaskeið, skulu slíkar umsóknir viðgerðast við vælvild.

**Stk. 9.**

Um starvsfólk eru vald í nevnd felagsins, skal tí vera givin heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini uttan lønarmiss, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum, arbeiðsósemjum og til at viðgera mál, ið álitisfólk felagsins ikki meta seg vera føran fyri at loysa.
Formaðurin ger arbeiðsplássið vart við hesi viðurskifti í hvørjum einstøkum føri.

**Stk. 10.**

Nevndarlimir felagsins hava rætt til tænastufrí við løn til nevndararbeiði 1 dag um mánaðin.
Formaður felagsins hevur rætt til farloyvi uttan løn, og hevur rætt at koma aftur í starvið uttan miss í starvs- og lønaraldri.

**Tórshavn, tann 14. september 1988**
**broytt tann 7. januar 1992**
**broytt 1.mars 2001**
**broytt tann 1.okt.2010**

***Føroya Landsstýri***
**Atli P. Dam, løgmaður**
Súsanna Danielsen, lønarstjóri

***Føroya Pedagogfelag***
**Hildur Paturson**
Bjørghild í Geil
Andrea Á. Sørensen
Marita Arge
Jacobina Hansen